## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og fyrrapartin regn. Seinnapartin ælingur, men onkur sólglotti. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Fyrrapartin andøvsgul av útsynningi og yvirhøvur turt. men seinnapartin hvassur vindur av suðri og regn. Seint um kvøldið støkkur hann vesturum, minni vindur og ælingur. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og ælingur, partvís vátaslettingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 3 og 6 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av útsynningi og suðri og leygarmorgunin møguliga okkurt ælið, men annars yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 5 og 9 stig.

# Jólamaðurin í Sørvági



**Sørvingar fingu forkunnuga vitjan eitt kvøldið í vikuni, ið fór. Sjálvur Jólamaðurin kom framvið á sleðu síni við tveimum reinsdjórum fyrispentum**

JÓLAVITJAN

Sørvingar fingu í vikuni, ið fór, vitjan av jólamanninum. Heldur tíðliga. Men tað var tí, at han noyddist í smiðju við sletuni.

Jólamaðurin er upptikin maður hesa tíðina. Hann reikar himmalrúmið runt at leggja depot til jóla, so øll børnini kunnu fáa sínar pakkar jólaaftan.

Men hetta kvøldið, hann var staddur á ferð nakað vestan fyri Mykines við reinsdjóraríknu sletu síni, rendi hann á eitthvørt, sum feyk gjøgnum luftina, og skaddi skinnarin.

So var bara eitt at gera, og tað var at seta kós móti Sørvági, sum var næsta stað, ein smiðja var, sum kundi umvæla skaðan.

Og tað er púra vist, at í Sørvági dugdu tey at hjálpa jólamanninum, sigur Eivin borgarstjóri.

Hann kom í duldum og lendi á havnarlagnum, har sleðan varð koyrd beint inn í smiðjuna hjá Sigurdi Jan. Og har slapp Karin, sum arbeiðir í smiðjuni, at umvæla skinnaran.

Tað tók tað mesta av náttini at gera hetta, so jólamaðurin slapp at sova í fitta jólahúsinum í Sørvági, meðan hann bíðaði. So fekk hann eisini eina tiltrongda hvíld, fortelur Eivin borgarstjóri.

Jólamaðurin var so glaður fyri hjálpina frá Karini, at hann lovaði at koma framvið aftur hvørt kvøld um jóltíðir, so børnini í Sørvági kunnu sleppa at síggja hann niðri við fótbóltsvøllin, áðrenn tey fara í song.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -13 |
| Nuuk | 0 |
| Qaqortoq | -2 |
| Ammassalik | -4 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 4 |
| Seyðisfjørður | 6 |
| Tórshavn | 8 |
| Lerwick | 8 |
| Aberdeen | 10 |
| London | 11 |
| Tromsø | 0 |
| Bergen | 6 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 2 |
| Keypmannah. | 7 |
| Helsinki | 4 |
| Moskva | 1 |
| Berlin | 7 |
| Warzawa | 6 |
| Kiev | 3 |
| Bukarest | 3 |
| Paris | 7 |
| Madrid | 7 |
| Róm | 18 |
| Malorca | 14 |
| Athen | 17 |
| Malta | 19 |
| Tunis | 20 |
| Beijing | 9 |
| New Dehli | 22 |
| Bangkok | 30 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | -- |
| New York | 4 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 11 |
| Meksikobýur | 18 |
| Panama | -- |
| La Paz | -- |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 28 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 974 hPa. eystan fyri Ísland fer eystureftir. Eitt annað lágtrýst, 966 hPa. sunnan fyri Hvarvið fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum mikunáttina.




**Í dag:**
Lágtrýstið vestan fyri Ísland stendur mestsum í stað og brúgvalagið haðani til Føroya fer í landnyrðing.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 06/12 kl. 06⁰⁰–07/12. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 7,4°
Minsti hiti máldur í des.: ÷10,5° - Mesti hiti máldur í des.: 13,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 6,0 mm – mált frá 06/12 kl. 06⁰⁰–07/12 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í desember: 61,7 mm

RADIOHANDILIN
v. Persson & Persson
Landsins bestu parabolskipanir



· Søla og tænasta
· Verkstaður
· Antennu- og parabolmontering
· Útleigan

N. FINSENSGØTA 16 · TEL 31 82 77
e-mail: radioep@post.olivant.fo

## VESTFALLSKYRRINDI

11. desember: Mánin næstur jørðini
12. desember: Tendring

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 8. des | 03.01 | 15.21 | 02.01 | 14.21 | 02.16 | 14.36 | 05.01 | 17.21 | 06.01 | 18.21 | 01.16 | 13.36 | 00.16 | 12.36 | 03.16 | 15.36 | 04.16 | 16.36 | 02.46 | 15.06 | 04.01 | 16.21 |
| 9. des | 03.43 | 16.05 | 02.43 | 15.05 | 02.58 | 15.20 | 05.43 | 18.05 | 06.43 | 19.05 | 01.58 | 14.20 | 00.58 | 13.20 | 03.58 | 16.20 | 04.58 | 17.20 | 03.28 | 15.50 | 04.43 | 17.05 |
| 10. des | 04.29 | 16.54 | 03.29 | 15.54 | 03.44 | 16.09 | 06.29 | 18.54 | 07.29 | 19.54 | 02.44 | 15.09 | 01.44 | 14.09 | 04.44 | 17.09 | 05.44 | 18.09 | 04.14 | 16.39 | 05.29 | 17.54 |
| 11. des | 05.22 | 17.50 | 04.22 | 16.50 | 04.37 | 17.05 | 07.22 | 19.50 | 08.22 | 20.50 | 03.37 | 16.05 | 02.37 | 15.05 | 05.37 | 18.05 | 06.37 | 19.05 | 05.07 | 17.35 | 06.22 | 18.50 |
| 12. des | 06.21 | 18.52 | 05.21 | 17.52 | 05.36 | 18.07 | 08.21 | 20.52 | 09.21 | 21.52 | 04.36 | 17.07 | 03.36 | 16.07 | 06.36 | 19.07 | 07.36 | 20.07 | 06.06 | 18.37 | 07.21 | 19.52 |

5 707265 100036 >